# Ítróttarfelag Fuglafjarðar




## ÍF - B71

LANDSKAPPING
Leygardagin 31. mei 2003
Kl. 15.00 í Fuglafirði

HAVSBRÚN

Ítróttarfelag Fuglafjarðar
Postboks 94
530 Fuglafjørður
Tel. 444 636
Fax 444 636

# ÍF - B71

3. umfar í landskappingini hjá 2. deild monnum
31. mei 2003

## Leikskrá 2

**Útgevari:**
*Ítróttarfelag Fuglafjarðar*

**Blaðnevnd:**
*Gunnvá Dam*
*Birgar Larsen*
*Janus Petersen*
*Steinbjørn í Lambanum*
*Rógvi Róin*

**Myndir:**
*Rógvi Róin*

**Kápumynd:**
*Atli Petersen er sloppin inn í botsteigin, og skal leggja bóltin innfyri. Myndin er frá heimadystinum ímóti B68 17. mei í ár, og sum vit vunnu 3-1*
*Mynd: Rógvi Róin*

**Prent:**
*Ítróttarfelag Fuglafjarðar*

**Uppseting:**
*Rógvi Róin*



?

### TEIR UNGU LEIKARARNIR SKULU SLEPPA

# AT ROYNA SEG!

Fyrstu tveir dystirnar í ár hevur tað verið hugaligt at sæð liðið hjá okkum leikt. Fyrstan dystin í Fuglafirði var spælið og taktiska skili ikki alla tíðina tað allarbesta, men leikararnir vístu, serliga í fyrra hálvleiki, hvussu teir ætla sær at vinna dystirnar í ár. –Við eini tættari miðverju – við Áka og Viggo mitt fyri og Jan og Sverra í síðunum – einum miðvølli við tveimum sentralum – seinastu tveir dystirnar hava John og Høgni Z manna hesi pláss – og ein í hvørjari av síðunum. Her hava Heini, Atli og Ken leikt. Longur frammi hava vit leikt við einum hangandi áleypara, sum hevur verið Eyðolvur og so einum heilt frammi. Hetta plássið hevur ein av okkara ungu stórtalentum Hanus spælt fyrimyndarliga á. Um hetta er fastan "stamman" er ikki víst, men tað alt bendir á, at tað verður nøkunlunda soleiðis. Sigfríður ætlar, at liðið skal síggja út.

Tó er at siga, at serliga Fritleif og Roy hava gjørt tað gott, tá ið teir eru komnir inn, ávíkavist á vinstra og sentrala miðvøllin. Roy er hálvskaddur í løtuni, men er kortini við í dag, og saman við honum á listanum yvir skaddar leikarar er Rógvi, sum enn einaferð er komin aftur til okkara at leika. Hann er tó somikið skaddur í løtuni, at hann helst ikki er tøkur fyrrenn eftir summarsteðgin. Men við royndunum hjá teimum báðum Róin-monnunum, er tyngdin á liðnum helst eitt sindur størri enn nú, serliga tá ið vit leika dystir ímóti liðum, sum hava fleiri royndar leikarar. So lat okkum vóna, at teir báðir koma fyri seg aftur skjótt.

Tað er eingin loyna, at verandi lið – og fyri tann skuld eisini hópurin – er rættuliga ungt – og haldi eisini vit kunnu siga óroynt. -Viggo, Ken, Heini og Eyðolvur (og sjálvsagt Roy og Rógvi eisini) eru einastu leikararnir, vit kunnu siga hava royndir á liðnum. John, Áki og Jan hava verið við nøkur ár, meðan allir hinir eru ungir og óroyndir. Men tað hevur tó verið ein fragd at sæð hesar ungu garparnar bæði til venjing og dyst. Ofta leika teir, sum um teir ikki hava gjørt annað. Og tað er eisini gott at síggja, at venjarin gevur teimum møguleikan, tí vit halda, at tað er einasti vegurin hjá teimum, at vera við til at lyfta fótbóltin í bygdini á eitt hægri støðið. Sigfríður vísir teimum álit og gevur teimum samstundis ábyrgd, tó uttan at leggja hana á ov tungt á herðarnar á teimum.

Vit vóna at positiva gongdin higartil heldur fram, og leikararnir, hjálparfólk og venjarin á besta hátt taka hvønn einasta av teimum sekstan dystunum, sum eru eftir, í fullum álvara, og gera sítt besta.-Røkkur tað ikki, so kunnu vit bert staðfesta, at vit hava brúk fyri í øllum føri einum árið afturat í næstbestu deildini; og vónandi verður tað við Sig-fríði sum venjara.

Við ynskjum um eitt framhaldandi gott kappingarár og góðan dyst í dag.





### UPPLFLYTINGARKANDIDATARNIR

# AV SANDI VITJA Í DAG

## Vit tveimum sigrum í tveimum dystum, er sjálvsálitið hjá okkara monnum gott, nú sandoyingar vitja



Í dag eru tað sandoyingar, sum vitja okkum. Og vit taka neyvan munnin ov fullan, um vit siga, at teir eru eitt av liðunum, sum koma at liggja í ovara endanum av kappingini. Og sum vónirnar hjá okkum eru í ár, kann sigast, at teir so eisini verða eitt av teimum liðunum, sum vit fara at kappast við um besta plássið í deildini.

B71 liðið er aftur í ár samansett av nøkrum eldri – skal kanska siga gomlum – leikarum, sum hava drúgvar royndir bæði í 1. og 2. deildarfótbólti og fleiri ungum og minni royndum leikarum.

Okkara menn, sum fara á vøllin í dag, hava sjálvsálitið í topp eftir tveir sigrar í teimum báðum fyrstu dystunum. Vit vunnu ein sannførandi 3-1 sigur í fyrsta dystinum á heimavølli ímóti B68, meðan vit síðsta vikuskiftið kneykraðu B36. Einasta málið skallaði okkara besti leikari hendan dagin, Høgni Z, í netið í yvirtíðini.

Verður hugt nærri at hesum báðum dystunum, so spældu vit væl til tíðir, og vit fylgdu taktiska uppleggnum hjá venjaranum. Í dystinum ímóti B68 sýntist tó sum um menn vórðu troyttir, eftir umleið 70 minuttir. Um tað manglaði dystarvenjing ella

*"Menn eru uppsettir, og geva seg 100%. Tað merkist, at kapping er um plássini á liðnum, og tað er gott"*

trygga 3-0 leiðslan í fyrra hálvleiki ávirkaði leikararnar, skal verða ósagt, men í dystinum í Havn síðsta vikuskiftið kempaðu leikararnir allar 90 minuttirnar og meir enn tað. –Og tað gav eisini úrslit og trý stig.

Sigfríður er væl nøgdur við teir báðar fyrstu dystirnar. –Vit hava seks stig fyri tveir dystir, so tað kann ikki vera betri. Samstundis skapa vit nógvar málmøguleikar, og halda mótstøðuliðunum frá okkara málið, vísir Sigfríður á. -Dysturin í Havn var fyrimyndarligur. -Vit halda nullið, og fáa mál í hinum endanum, enntá í yvirtíðini, og tað vísir, at menn vilja vinna dystirnar, vísir Sigfríður á.

Til dystin í dag eru allir menn tøkir, og tí vera mest sum ongar broytingar, í mun til dystin í Havn. Rúni verður tó ikki við í hópinum hesaferð, og í hansara pláss kemur Roy, sum er við at verða klárur aftur. Hann fekk ein vøddaskaða ímóti B68. Liðið, sum byrjar dystin í dag, verður helst sama sum í Havn.

# SMÆÐIN, MEN TÓ FREKUR!

**Fritleif í Lambanum er yngsti leikarin á besta ÍF-liðnum í ár. Hóast sín unga aldur, smæðist hann ikki burtur. Á vøllinum kann hann verða frekur, hóast sítt smæðna lyndi.**



Yngsti leikarin í 20-mans hópinum hjá 1. liðnum er Fritleif. Hann er júst vorðin 17 ára gamal. So ikki kann sigast annað, enn at hann hevur framtíðina fyri sær, í øllum førum, um hugt verður eftir hansara fótbóltsligu evnum í dag.

Sjálvt um hann á vøllinum kann tykjast at vera smæðin, so er hetta ikki nakað, sum eyðkennir unga dreingin. Tvørturímóti vísir hann á vøllinum frekleika og sjálválit, sum sjálvt fáur garvaður leikari megnar. Hann er eisini skjótur og driblisterkur.

Fritleif sigur størstu orsøkin til, at hugurin til fótbólt er tann, hann er og hann er komin so langt, sum hann er, eru foreldrini. –Mamma og babba hava stuðla mær ógvuliga væl frá fyrstan tíð av. Tey hava ferðast við mær og liðnum nærum hvørjaferð, líkamikið hvar vit hava leikt. Og tað eri eg glaður og takksamur fyri, sigur Fritleif. Men eisini tað at vit altíð hava havt góðar venjarar og annaðhvørt ár eitt gott lið, hevur gjørt sítt til, at eg havi ment meg sum fótbóltsleikara, heldur Fritleif.

Landsliðsvenjararnir hava eisini sent boð eftir Fritleifi, hvørjaferð okkurt hevur verið á skránni. Hann hevur leikt bæði á U-14 landsliðnum og síðsta ár var hann millum føstu leikararnar á U-17 landsliðnum. Við U-14 landsliðnum var Fritleif í Skotlandi til eina kapping í Aberdeen. Í fjør var hann tvær ferðir og ferðaðist við U-17 landsliðnum. -Fyrst í Svøríki til NM fyri U-17 landslið og síðani í Rumenia ísambandi við undankapping til EM. Og tað var eisini í fjør, at hann hevði sína størstu fótbóltsligu uppliving higartil. –Í NM kappingini í Svøríki leiktu vit ímóti norðurlendsku grannalondunum, og dysturin ímóti Danmark gjørdist serliga spennandi, og tað er uttan iva mína størstu fótbólsliga uppliving. Dysturin endaði við javnleiki 1-1, eftir at vit komu afturum tíðliga í dystinum.

Á U-17 landsliðnum leikti Fritleif allar dystirnar í teimum báðum kappingunum í Svøríki og Rumenia. Hann leikti í verjuni, bæði í høgru og sum sveepari. -Men hetta eru absolutt ikki míni ynskipláss á vøllinum, er Fritleif skjótur at svara. –Tað var mangul uppá verjuleikarar, og tí endaði eg nokk sum verjuleikari á landsliðnum. Ynskiplássið hjá Fritleifi er á miðvøllinum, og tað er eisini har, hann hevur leikt við 1. liðnum, tá ið hann hevur fingið møguleikan.

Um tað er fyrimyndin hjá honum á fótbóltsvøllinum, Veron, sum hevur gjørt sítt til, at hann vil vera miðvallaleikari, vil hann ikki út við. –Men hann er besti leikarin í heiminum, sigur Fritleif. –Og United er absolutt besta liðið. Vit viðmerkja ikki tað, men gleðast um, at hava ein so góðan og evnaríkan ungling á okkara liðið.

Vónirnar hjá Fritleifi í ár eru, at vit flyta upp, og at hann fær so nógva spælitíð á besta liðnum sum gjørligt, soleiðis at hann harvið kann menna seg sum leikara.

Tá ið vit spyrja Sigfríð um Fritleif, er hann skjótur at svara, at hann er størsta talenti í Fuglafirði í løtuni. Og hann leggur afturat, at blívur hann við, sum hann ger nú, so er hann fastur maður á liðnum um stutta tíð. Og spælitíðina skulu hann og hinir ungu fáa, tí tað er einasta mátin, at blíva ein betri fótbóltsleikari, sigur Sigfríður. So Fritleif, drív á, og vit siggja teg á vøllinum hvønn leygardag – og sunnudag - um ikki ov langa tíð.



## TÚ

**Navn:** Fritleif í Lambanum
**Føðingardagur:** 13.04.1986
**Føðistað:** Tórshavn
**Starv:** Skúlanæmingur. Arbeiði hjá Haraldsen eftir skúlatíð
**Pláss á vøllinum:** miðvallari
**Hædd og vekt:** 175 cm og 60 kg
**Yvirtrúgv:** ongin
**3 orð sum lýsa teg:** ungur, lekkur og smekkur
**Torførast mótstøðumaður:** Viggo
**Frítíðarítriv:** Tekken 4 (PlayStation)
**Vónir fyri 2003:** At fáa so nógva spælitíð sum møguligt, og flyta upp í 1. deild



## TÍN ÍTRÓTT

**Fyrsti dystur á 1. liðið:** ímóti AB í steypakappingini í ár
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** Tá ið eg var uml. 6 ára gamal
**Aðrar ítróttargreinar:** ongar
**Minnigarríkasti dystur:** Við U-17 landsliðnum ímóti Danmark. Vit spældu javnleik 1-1
**Størstu fótbólstliga ávirkan:** babba
**Besti fótbóltsleikari:** Juan Sebastian Veron
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** tennis
**Hvat slag av venjing dámar tær best:** "dystar-venjing"
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** renning
**11 teir bestu fótbóltsleikararnir í heiminum:** Kahn - Silvestre, Brown, Ferdnand, G. Neville - Giggs, Veron, Scholes, Beckham - Van Nistelrooy, Ronaldo

## TÍNIR FAVORITTAR

**Matur og drekka:** Coca-cola og enskan búff
**Slag av tónleiki:** mest sum alt
**Sjónvarpssending:** South park
**At slappa av:** hyggja eftir einum góðum filmi
**Troyggja nr.:** Nr. 6
**Besti fótbóltsleikari yvirhøvur:** Valdemar (hjá B71)
**Sjónvarp/filmstjørna:** Robert de Niro
**Besta bók/blað:** Ð!



O·N·L·Y
VERO MODA

>> vælkomin í KATO
Fuglafjørður






Fysioterapiviðgerðarstova

530 Fuglafjørður
Telefon 44 51 44

Álvur Hansen, fysioterapeutur
Turið L. Petersen, fysioterapeutur



**Lastvognskoyring**




**Øll lastvognskoyring verður gjørd**

**Kári Zachariassen**

**530 Fuglafjørður**
**tel. 444 245 ella 217 245**



**Føroya Shell**

| | |
|---|---|
| Streymoy | 34 74 00 |
| Norðoyar | 45 77 11 |
| Eysturoy | 44 87 11 |
| Vágar | 33 27 11 |
| Sandoy | 36 17 11 |
| Suðuroy N | 37 27 11 |
| Suðuroy S | 37 47 11 |








**HYDRAULIK**
**RÁÐGEVING**
**VERKÆTLANIR**
**ÍSETANIR**
**UMVÆLINGAR**
**MASKINUMVÆLINGAR**
**SVEISING, DREYING, BORING OG FRESING**



**Sølu-og tænastuumboð fyri:**

- Rapp Hydema (trol- og hjálpispøl)
- Rapp Hydema Syd (garna- og línuspøl, kraftblokkar, Capstanar)
- Rapp Bomek (skipsútgerð)
- Palfinger (marine kranar)
- Pullmaster (lossi- og kranaspøl)
- Triplex, Hydralift (eykalutir)
- Dension hydraulic (pumpur, ventilar v.m.)
- Danfoss Hydraulik (motorar, pumpur, ventilar,v.m.)
- Vickers (pumpur, ventilar v.m.)
- Rexroth (pumpur, ventilar v.m.)
- Parker Hydraulics (filtur, pumpur, ventilar, fittings v.m.)
- Casappa (tannhjólspumpur 4-40 ltr.)
- Hagglund (spælimotorar)
- Dinamic Oil (kranaspøl)
- Finn Filter (hydraulik-, brenniolju og smyrjioljufiltur)
- FBO (hydraulikfiltur)
- Trelleborg (idnaðarslangur)
- ABC (dieselmotorar)
- Iveco (dieselmotorar)

**Á goymslu:**

Hydr, slangur og fittings, hydr, rør og fittings, (manøvri- og kúluventilar, kúluleigir, hydr. filtur, smyrji- og brenniolju-filtur), koblingar og koblingshúsar, magnetkoblingar, tetningsringar, stempul, stempulstengur o.m.a.

**KJ-HYDRAULIK**

P/F KÁRI JOHANNESEN, maskinverkstaður
Postbox 110 FO-530 Kambsdalur (Fuglafjørður) Faroe Islands
Tel. +298 444170 Fax +298 444265
e-mail: kj@kj-hydraulik.com www.kj-hydraulik.com


Salong Yndi
530 Fuglafjørður
Tel. 444 490


LEIÐANDI
Altíð til dystin fús
FØROYA BANKI


Bílegging av pizza
HOTEL
www.pizza.fo
Team 85 358000
P.O. Box 97
FO-110 Tórshavn
Tel +298 350 000
Fax +298 350 001
hotel@hotel.fo
www.hotel.fo
Hotel Tórshavn er hotellið í miðbýnum. Hotel Tórshavn virkar bæði sum hotel og sum sjómansheim. Á hotellinum eru allir hentleikar - frá gisting til skeiðsvirksemi og frá lættum kosti til fínan kost. Hotellið hevur 41 seingjarpláss. 20 starvsfólk arbeiða á hotellinum.


Ferðaseðlar www.fonnflog.fo
kring allan knøttin
FONN FLOG
FO-700 Klaksvík · Tel. 456363 · Fax 457373 · fonnflog@fonnflog.fo




FAXE KONDI
MED DRUESUKKER
www.kondi.dk




**VØRDSLAN**
WEARHOUSE
Í Sløð • 530 Fuglafjørður • Tel. 444 747




**TOYSTOVAN** tel. 444637/444075 530 Fuglafjørður

# SV - TRANSPORT

**Allur flutningur við:**

**Lastbilum | Kranabilum | Trailarum**

**Dumparum | Bingjubilum**

**530 Fuglafjørður** **tel. 44 41 77**



**Koyrið á ÍF....**
**..eg stuðli í øllum førum**



**Tilfar til umvælingar, ábøtur ella annað....**
**....spyr fyrst hjá okkum!!**

**Fuglafjarðar Timburhandil**
tel. 444 126






Fiskamjøl



Fiskamjøl er ein proteinkelda, og verður millum annað brúkt til fóðurblandingar til alifisk, høsnarungar, svín og neyt.

Fiskalýsi



Lýsið verður brúkt til alifóður, margarin og aðra tøkniliga nýtslu.

Fiskafóður



Fóðrið fer til alifisk. Fiskafóður er ein tann orkuríkasti úrdráttur, ið yvirhøvur verður framleiddur.

Uppisjóvarfiskur



Uppisjóvarfiskur er bæði matfiskur og fóðurfiskur.

HAVSBRÚN

**HAVSBRÚN**
**Havsbrún Ltd. · 530 Fuglafjørður**
**tel. 444 100 · fax 444 160**
**havsbrun@havsbrun.fo**
**www.havsbrun.fo**



## Frá dreymi til veruleika

Hava tit brúk fyri einl tekning, vilja tit smíðja sjálvi ella skulu tey vera lyklaklár.

Eg bjóði meg til:
- at tekna
- at byggja
- at biðja um tilboð uppá sanitet, el hita o.s.fr.

Ring og eg gevi eitt óbindandi tilboð.

**JLJ - BYGGING**
v. Jørmund L. Juul (verkfrøðingur & húsasmiður)

☎ 21 47 87 & 44 47 87
teldupostur: jljuul@post.olivant.fo



CLIMACOOL RESPW
**800⁰⁰**



REKORD
**700⁰⁰**



A CUB.TWIN STRI
**1.400⁰⁰**



SUPERSTAR II
**700⁰⁰**

**P/F THOMAS DAM**
ÍTRÓTTUR á Glyvrum - Glyvravegur - Glyvrar - tel 44 73 99 - fax 44 73 97



# Fuglafjørður



býurin, har mentan og vinnulív taka lógvatak



býurin, har náttúra og fólk eru blíð

býurin, har fortíð og nútíð hittast

býurin, har øldirnar tala



**Stutt sagt:**



býurin, har nógv hendir

býurin, ið er eina vitjan verdur

**Fuglafjarðar kommuna**
tel. 44 40 06 fax 44 46 57 fko@fuglakomm.fo

## Fuglafjarðar Keypsamtøka

Tel. 444 095 - 444 495
Fax 444 895



Gardintoy
Gardinstengur
Persiennur
Rullugardinur
Liftgardinur
Tógv & stokkar
Uppskriftir

Vit seyma gardinur
Støkk inn á gólvið til eitt
gardin ella tógv prát

**Profa Farvur**

v/Petur Gaardlykke · 600 Saltangará · tel. 44 91 49



# Heildarveiting av tí heimskenda merkinum HP (Hewlett Packard)





HEWLETT® PACKARD
Expanding Possibilities

**Alt innan heimateldur, virkisteldur, servarar, prentarar, net og mangt annað....**

**Avtala um viðlíkahald av teldum/teldukervi kann gerast út frá tygara tørvi.**

**Arbeitt verður fyri virkir, skúlar og stovnar.**

Vit selja og veita undirvísing í bókhaldsskipanini Stellar Office og Stellar Office Pro

## Atlantic Online Sp/f

Í Støð 8
FO-530 Fuglafjørður
Tlf: +298 444487
e-post: atlantic@online.fo

**Alfa Seafood Sp/f**
Box 10 • FO-530 Fuglafjørður • Tel. +298 44 49 51
Fax +298 44 48 48 • E-mail: alfa@post.olivant.fo

FAROE
SEAFOOD

Fiskavirkið í Fuglafirði · Postboks 53 · tel. 444 500 · faks 444 580



BAADER®

Vit hava hópin av eykalutum til BAADER-maskinur á goymslu.

Nú umboða vit eisini Fomaco saltsproytur.

P/F Petur Larsen




Föroya Bjór
PILSNAR


Reiðari innan frakt- & sandbátar
Krana- og lastvognskoyring
Sandsøla
SANDGREVSTUR
Stovnað 1949
530 Fuglafjørður
tel. 444 121
fax 444 921


Hegn
15 ára royndir við tí grøna hegninum!
TEL 31 14 00
Landsins størsti veitari
P/F THOMAS DAM
Á HALSI • HEYKAVEGUR 1


B S
P/F BOÐASTEINUR
Bakkavegur 26
FO-530 Fuglafjørður
Faroe Islands
Tlf. +298 444800
Fax +298 444840
E-mail: alibo@post.olivant.fo


Vit hava útgerðina til trol-, nóta- og alivinnuna
VÓNIN
www.vonin.com


HEILDARLOYSNIR TIL ALIVINNUNA
HEILDARLOYSNIR TIL ALIVINNUNA
UNDIRVATNSLJÓS
UNDIRVATNSKAMERA
TRÁÐLEYST VIDEO SAMSKIFTI
ALARMSKIPANIR
PLC-STÝRINGAR
EL-MOTORAR
EL-LUTIR
FREKVENS UMFORMARAR
EL-TALVUR
FYLGISVEINASJÓNVARP TIL SKIP
JT electric
JT electric Ltd. Kambsdalur Faroe Islands Tel +298 474444 Fax +298 474445 jtelectric.com

## *Blómuhandilin*

# *Orkis*

*625 Glyvrar*

*Blómutyssi, plantur, samanplanting, kurv, brúðarblómutyssi, borðprýði, kransar o.a.*

***Stórt úrval av gávulutum***

***tel 44 82 89***
***fax 44 89 89***

---

## Danny Transport

**Tel. 31 91 92**

**Flutningur um allan heim!**

---

**Landsins størsta og besta úrval av ítróttarheiðursgávum**

**Steyp**
**Heiðursmerki**
**Heiðursbrøv**
**Toy við búmerki**
**Streamers**
**Klistrimerki**
**Seruppgávur við gravering**

**Vit seta títt búmerki á klistrimerki, streamers, toy, minnislutir og mangt annað**

FA. **EILIF ARGE**
**KLAKSVÍKSVEGUR • 700 KLAKSVÍK**
**TLF. 45 51 64 • FAX 45 75 76**

---



## Tannlæknastovan

Steintór Larsen tannlækni

Brynhild Maria Lamhauge tannrøktari

Viðtala:
8.00-12.00 og 13.00-16.00

Torkilskrókur 8 530 Fuglafjørður tel. 444 358








### Nissan Micra

Tann nýggi Nissan Micra er ætlaður at skapa gleði millum fólk.

Tann nýggi Nissan Micra hevur til dømis minsta vendiradius í sínum flokki. Nýggi Micra hevur eisini mest framkomnu lásiskipan hugsast kann. Og tá ið tú setir bilin frá tær, lýsir hann tær heim. Vitjið hjá Nissan við Oyggjarvegin ella vitjið heimasíðuna www.nissan.fo



Nissan Micra

**P/F Meinhardt Arge**
við Oyggjarvegin
Tórshavn
tel. 345400 • fax 345401

## Bussar til øll endamál



Serflutningur til rørslutarnaði
Bólkaferðir, bæði innan- og uttanlands
Ítróttarferðir, bæði innan- og uttanlands
Skúlabarnakoyring
Bygdaleiðir
Bussar frá 7 til 56 persónar

Spf. AP Andreas Poulsen BUSSKOYRING
✆ 22 52 20 - 44 17 20
FO-513 Syðrugøta · e-mail:pouand@post.olivant.fo

## Heimavirkis søla og framsýning

Piddasa handil

FUGLAFJARÐAR HEIMAVIRKISFELAG

Gallari Ribarhús

Opið er:
mán.-fr: 15.00-17.30
leyg.: 11.00-13.00

Tel. 444 427

## Altíð nýbakað breyð

Sunnumorgnar fæst breyð á hesum støðum:
Statoil í Leirvík
Hjá Halluri í Gøtu
Statoil í Skálabotni
Statoil í Saltangará
Kiosk Vár í Saltangará
Statoil á Strondum

Handilin er opin soleiðis:
Má-Ley: 07.00-17.30
Sun: 08.30-10.30

BREYÐMOLIN
530 Fuglafjørður · tel. fax 444 388

GRANNSKOÐARASTOVAN Sp/f
480 Skála tel. 44 16 66 fax 44 18 71







ÚB
· www.bilar.fo

## Úrvalsbilar Spf.

- Søla av brúktum innfluttum bilum
- Alt vanligt verkstaðsarbeiði verður gjørt

Bakkavegur · 530 Fuglafjørður · tel. 444 943 · fax 444 638 · Fartel. 281943

HeimaGreiðslan




Tú gert av hvar og nær. Við HeimaGreiðsluni er Sparikassin opin – har og tá tú ynskir tað.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo

# AVNARMAÐUR VIÐ STÓRUM H!

**Venjarin, sum vit hava í stólinum hesaferð, er 1. iðsvenjari okkara, Sigfríðu Clementsen. Hann má sigast at vera havnarmaður við stórum H, sjálvt um hann trívist væl norðanfyri - men ikki ov leingi í senn!!!!**



Í nógv ár hevur ÍF ikki havt lið í 1. deild í fótbólti, hvørki hjá monnum ella kvinnum, men tó tykist stórur áhugi vera millum fólk at fylgja við í ovastu deild hjá felagnum, 2. deild hjá monnum.

ÍF hevur í ár sett nýggjan venjara at taka sær av at venja 2. deild. Tað er havnamaðurin Sigfríður Skaale Clementsen, sum hevur fingið hesa uppgávuna at røkta.

Sigfríður er 30 ára gamal og mong munnu minnast hann sum ein av teimum heilt góðu 1. deildar leikarnum í 90unum.

Sigfríður var upprunaliga HB-ari - enntá við stórun H. Hann hevur øll barnaárini og part av ung-dóms-árunum spælt við HB. Hann var við, tá smápiltadeildin byrjaði í 1983 og var eisini við til at vinna FM hetta árið.

Sigfríður gavst at spæla fótbólt í 2 ár, tí hann fór til skips. Hetta var aftan á dreingjaliðsaldur. Eftir hetta fór hann á ítróttarskúla í Danmark og var ikki aftur í føroyskum fótbólti fyrr enn seinsta ár við unglingum. Hetta árið var hann eisini við til at vinna meistarheitið fyri unglingar við HB.

Hóast Sigfríður hevði verið burtur frá fótbólti í so langa tíð, so var hann í 1992 sum 19 ára gamal við á 1. deildarliðnum hjá HB. Hann spældi við 1. deild hjá HB til 1996, tá hann skifti til B36, og var við til at vinna FM-heitið fyri hitt havnaliðið hetta árið.

Í 1997 fekk Sigfríður skaða, sum hann hevur drigist við síðan. Hesin skaðin hevur gjørt, at hann hevur lagt fótbóltsskógvarnar á hillina, men áhugin fyri fótbólti er kortini ikki farin.

Sigfríður hevur síðan verið við í fótbólti sum venjari. Hann hevur m.a. vant 2. deild hjá B36 og nú í ár besta liðið hjá ÍF.

Sigfríður hevur tikið venjaraútbúgvingina, sum til ber at taka í Føroyum, og hann hevur gingið á venjaraskúla í Aalborg í eitt ár. Hesin skúlin hevði, umframt fótbólsts- og hondbóltsvenj-ingar, eisini lærugreinar sum pædagogik, sosiologi, fysiologi, anatomi, psykologi og ítróttarsøgu.

Hesar lærugreinarnar lógu fyrrapart, meðan venjingin lá seinnapart. Tey, ið gingu á skúlanum, skuldu venja eitt lið, og her vandi Sigfríður eitt dreingjalið. Hann hevði ábyrgd av sjálvari venjingini, meðan lærarar á skúlanum hugdu at venjingini.

Umframt at venja hetta dreingjaliðið var hann saman við hinum á venjaraútbúgvingini við til nakrar venjingar hjá FC Aarhus.- Fyrrapartar sum fyriskipari og seinnapartar sum eygleiðari.

Sigfríður hevur gingið á skúlanum, men manglar tó at fara upp í triðju og seinastu uppgávuni fyri at fáa prógvið frá skúlanum.

Ikki kann sigast annað enn at ÍF í ár hevur fingið ein venjara sum hevur royndirnar at taka sær av besta liðnum hjá felagnum. Vit ynskja Sigfríði vælkomnan til felagið og ynskja honum góða eydnu í starvinum.



# 9 SPURNINGAR til venjaran!

**Navn:**
Sigfríður Skaale Clementsen
**Føddur:**
27.01.73

**Hvussu leingi hevur tú verið venjari?**
Síðan eg var 15 ár. Tá byrjaði eg at venja smápiltarnar hjá HB.

**Hvussu ber tað til, at tú bleiv venjari í 1998?**
Eg hevði áhuga fyri fótbólti og varð biðin um at venja smápiltarnar.

**Hevur tú nakra útbúgving sum venjari?**
Ja, eg havi øll grundskeiðini, A-E, ungdóms- og seniorútbúgvingina, og eg havi gingið á venjaraskúlanum í Aalborg í fjør, ein útbúgving, sum tók eitt ár.

**Hvat leggur tú størsta dentin á sum venjari?**
Tað er at fáa tingini at hanga saman á ÍF-liðnum. ÍF hevur í fleiri ár havt bestu leikarnar. Eg vil fegin verða við til, at ÍF eisini fær besta liðið.

**Hvat mál hevur tú sett tær sum venjari í ár?**
Málið er greitt, tí tað er eitt mál, sum ÍF longu hevur sett mær, - nevniliga at 2. deild hjá ÍF skal flyta upp í 1. deild. Tó haldi eg tað vera heldur djarvt at seta hetta mál, tí hetta krevur nógv, ikki bert av mær, men eisini av øllum leikarunum, og sigast kann, at tað hevði verið gott at havt einar tveir leikarar afturat.

**Hvørjar framtíðarætlanir hevur tú sum venjari?**
At vera venjari í 1. deild hjá ÍF næsta kappingarár.

**Hvørja venjing dámdi tær best, tá tú spældi fótbólt?**
At skjóta upp á mál og at spæla dyst er altíð stuttligt, men tað taktiska hevur eisini altíð sagt mær nógv. Til tíðir haldi eg, at fótbóltur og talv líkjast.

**Hvørja venjing dámar leikarunum serliga væl?**
Eg haldi, at tú sum venjari hevur lyndi til at gera nógv av tí, tú sjálvur helt vera stuttligt, og tí ávirkar hetta ofta leikararnar soleiðis, at teir

*(framhald á bls. 26)*




Tlf. 444215
Fuglafjørður
Lamineraðir frontrútar til øll bilmerkir


FLÜGGER
• Dygdarmáling til lágan prís
• Lyklar, innramming, gólvtilfar og fiskireiðskap til smábátin
*Tasjan á Bugnum*
530 Fuglafjørður
tel. 44 50 44
fartel.: 22 11 09

# ÁRSINS ÍF´ARI 2003

## HANUS DAGSINS MAÐUR Í FYRSTA DYSTINUM



Í trygga 3-1 heimasigrinum ímóti B68 fyri tveimum vikum síðani, vóru fitt av atkvøðuseðlum komnir inn. Hanus, sum skeyt tvey av málunum, varð valdur til dagsins mann.

Fyri tað fær hann ein døgurðabita fyri tvey frá Pól á Muntra. Vit ynskja honum tillukku!

**Atkvøðutal**

| | ÍF-B68 | Íalt |
|---|---|---|
| Hanus Eliasen | 51 | 51 |
| Sverri Ellingsgaard | 36 | 36 |
| Eyðolvur R.-Petersen | 35 | 35 |
| John S. Thomsen | 22 | 22 |
| Áki Petersen | 29 | 29 |
| Fritleif í Lambanum | 21 | 21 |
| Atli Petersen | 8 | 8 |
| Høgni Zachariasen | 7 | 7 |

Atkvøtt verður til allar heimadystirnar í landskappingini ella íalt 9. Tann leikari, sum veljarin heldur hevur spælt best, fær 5 stig, næstbesti 3 stig og triðbesti 2 stig.

Atkvøðuseðlarnir fáast í ovaru hæddini í Ítróttarhúsinum. Seðilin her á síðuni kann eisini nýtast. Hvør veljari hevur bert loyvi at lata ein seðil inn til hvønn dyst.

### VINNINGAR

- Ársins ÍF´ari fær 1.000,-
- Nr. 2 fær 500,-
- Nr. 3 fær 500,-

Fa. Eilif Arge í Klaksvík letur prýðislutir til nr. 1, 2 og 3.

Restaurant Muntra letur sunnudagsdøgurða fyri tvey til besta leikaran í hvørjum av landskappingardystunum í ár.

Restaurant Muntra

Tá kappingarárið er av, verður lutakast millum allar atkvøðuseðlarnar um eitt krov frá Haraldsen.

**HARALDSEN**
- títt keyp -

## Atkvøðuseðil

ÍF - B71, 31. mei 2003

Dystur: ____________

Nr. 1 (5 stig): ____________ Leikari

Nr. 2 (3 stig): ____________ Leikari

Nr. 3 (2 stig): ____________ Leikari

*Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hæddini í ÍF-húsinum seinast 15 min. eftir loknan dyst.*

Veljari: ____________ Tel.: ____________



## 9 SPURNINGAR...FRAMHALD

(Framhald av bls. 27)

eisini halda hetta vera stuttligt. Hetta ger eisini, at eg av og á taki lærubøkurnar fram aftur fyri at taka aðrar venj-ingar við. Hertil má eg tó leggja afturat, at eg eri ikki komin til Fuglafjarðar við hópin av nýggjum venjingum. Vit nýta øll somu venjingar, sum passa til okkara spælistíl.

**Hvussu dámar tær at vera venjari?**

Mær dámar væl at vera venjari. Hetta er ein góður máti at vera við í fótbóltinum, hóast eg vegna skaða ikki fái spælt sjálvur. Tað er eisini stuttligt at arbeiða við fólki. Áður havi eg ikki vant 1. deild hjá nøkrum felagi, og tí havi eg ikki havt teir bestu leikararnar í mínum hópi, men tað havi eg nú hjá ÍF, og tað er ein spennandi uppgáva.

## KAPPINGAR

### ÁRSINS ÍF´ARI 2002 - vinnararnir funnir

Í sambandi við kappingina Ársins ÍF´ari í fjør eru fleiri vinnarar funnir.

Áskoðararnir valdu Høgna Z til besta leikarin í 2002. Hann fekk 273 atkvøður. Nr. 2 og 3 vórðu ávíkavist Eyðolv R.-Petersen við 191 atkvøðum og John Thomsen við 174 atkvøðum.

Drigið varð eisini millum allar atkvøðukvøðuseðlarnar um eitt krov frá Haraldsen. Krovið vann Haldor Ellingsgaard.

Vit ynskja teimum øllum tillukku.

### ÍF TIPS 13 - vinnarin og svarini frá síðstu kappingini

Bjarni Larsen gjørdist besti tipparin seinast. Hann hevði 9 rætt av 13 møguligum, og var hann tann einasti, sum hevði so mong rætt. Hann fær ein kassa av sodavatni frá Føroya Bjór. Tillukku við tí.

Røttu svarini til teir 13 spurningarnar seinast eru:

| Spurningar - 1. Umfar: | Tekn: | Svar: |
|---|---|---|
| 1. Toppskjúttin í føroysku 1. deild 2002 gjørdist? | X | *Andrew av Fløtum* |
| 2. Hvat var liðið, ið endaði niðast í 1. deild 2002? | 1 | *EB/Streymur* |
| 3. Nær var ÍF stovnað? | 1 | *1946* |
| 4. Hvør er liðleiðari hjá ÍF 2. deild? | 2 | *Trúgvi Nesá* |
| 5. Hvør hevur leikt flest dystir í Premier League (10 ár)? | 1 | |
| 6. Hvør leikari hevur fingið skjótasta reyða kort í Premier League? | X | *Sami Hyypia* |
| 7. Hvussu eitur heimavøllurin hjá Chelsea? | 2 | *Stamford Bridge* |
| 8. Hvør er yngsti málskjútti í Premier League? | 2 | *James Milner* |
| 9. Hvat av hesum liðum hevði best málúrtøku í Premier League 2002/03? | 1 | *Leeds* |
| 10. Brotsspark! Skjúttin sparkir bóltin 1,5 metur paralelt við málinjuna. Ein viðleikari rennur inn og sparkar bóltin á stongina, og bólturin kemur síðani út til brotssparks-skjúttan, sum síðani skorar! Hvat ger dómarin? | 1 | *Dømur umspark* |
| 11. Hvussu breið kann málinjan max. verða? | 2 | *12 cm.* |
| 12. Hvussu breitt og høgt skal málið verða? | 1 | *h: 2.44 m og b: 7,32 m* |
| 13. Hvussu nógv mál gjørdi Pelé í sínum 1363 dystum? | 2 | *1281 mál* |

**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
**Postboks 94**
**530 Fuglafjørður**
**Tel. 444 636**
**Fax 444 636**

***Aðalnevndin:***
Formaður
Rúni Petersen, tel. 215887
2. formaður
Høgni á Lakjuni tel. 444418
Peningarøkil:
Linda Joensen, tel. 445132
Skrivari:
Hildigarð Eliasen, tel. 444052/228771

***Fótbóltsdeild:***
Hildigarð Eliasen tel. 444052
Eivin Breiðaskarð, tel. 214003
Ólavur Larsen, tel. 224659
Mortan Nónsgjógv
Alli Petersen, 444 018

***Venjarar:***
***2. deild:***
Sigfríður Clementsen, tel. 31 76 59
***3. deild:***
Báður Mortensen, tel.
***4. deild:***
Eivin Breiðaskarð, tel. 21 40 03
***Old Boys:***
Sonni Jensen, tel. 444 975
***Unglingar:***
Birgar Larsen, tel. 21 37 10
***Dreingir Ø.:***
Janus Petersen, tel. 26 43 99
***Smádreingir Ø.:***
Ragnhard Petersen, tel. 26 02 90
***Smádreingir 1/2 vøllur***
Ragnhard Petersen, tel. 26 02 90
***Piltar 1/2 v a-b.:***
Hanus Eliasen, tel. 22 17 52
***Smápiltar:***
Atli Petersen, tel. 26 82 95
***Gentur:***
Durita Djurhuus, tel. 44 50 24
***Smágentur:***

***G.10-12 ár:***
Jónfríð Joensen, tel. 254170
***Yngst:***
Hanna Poulsen

# ÍF — B71

**ÍF**

1. Fróði Poulsen
2. Áki Petersen
3. Jan Skoradal
4. Viggo Johannesen
5. Heini Heinason
6. Fritleif í Lambanum
7. Martin Hansen
8. Sverri Ellingsgaard
9. Rúni Petersen
10. Hanus Eliasen
11. Eyðolvur R. Petersen (liðsk.)
12. Rógvi Róin
13. Høgni á Lakjuni
14. Ken Bærentsen
15. Eyðun Ryggshamar
16. Jákup Helgi Egholm
17. Høgni Zachariassen
18. Atli Petersen
19. Roy Róin
20. John S. Thomsen

Venjari: Sigfríður Clementsen
Hj.venjari: Rógvi Róin
Liðleiðarar: Trúgvi Nesá
Tórstein Joensen

**B71**

___ Valdemar Nowiscki
___ Julian Thomsen
___ Eirikur Poulsen
___ Ernst Løkjá
___ Kári Sørensen
___ Tummas Pauli Olsen
___ Mikkjal Hentze
___ Símun Hansen
___ Eli Hentze
___ Jónsvein Thomsen
___ Kristoffur Vidtfeldt
___ Hanus Clementesen
___ Janus Petersen
___ Magnus Olsen
___ Torbjørn Jensen

Venjari: Tom Saintfelt
Hj.venjari:
Liðleiðari: Suni Vatnsdal

## Dómarabólkur:

Dómari: Petur Hans Joensen, KÍ
Hjálpardómarar úr KÍ

## Bóltsponsorur: